# Suzuki ”Bandit” við vatnkøldum motori og ABS

**Fleiri nýggjheitir eru á veg frá Suzuki í Japan. Nýggjastu “GSF Bandit ” í 650 cc og 1250 cc útgávunum hava nú vatnkøldar motorar og ABS-bremsur**

MC
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*



Motorsúkklurnar verða alt meira framkomnar og tryggar, so hvørt sum nýggj modell koma á marknaðin.

Fleiri nýggjheitir eru á veg frá Suzuki í Japan, ið teljast millum heimsins størstu framleiðarar av motorsúkklum og hava eitt sera stórt programm við nógvum ymiskum útgávum av motorsúkklum.

GSF modellini, við eftirnavninum ”Bandit”, hava nú fingið vatnkøldan motor í bæði 650 cc og 1250 cc útgávunum, umframt at tær eisini hava ABS-bremsur.

Hetta eru súkklur, sum Suzuki væntar sær nógv av. Málsetningurin var at gera tær mest framkomnu súkklurnar í sínum klassa, bæði hvat designi og teknikki viðvíkur.

Nógv verður gjørt burtur úr komfortinum, t.d. kunnu bæði setur og róður stillast í hædd.

Motorarnir koyra sera væl, eru kvikir og trekkja væl, heilt frá tómgongd til reyða økið á snúningsteljaranum. Ein góð koyriuppliving. 650 cc útgávan hevur 85 hk við 10.500 snún/min, meðan útgávan við 1250 cc motorinum hevur 98 hk við 7.500 snún/min.

Frá MC-Søluni verður sagt, at súkklurnar koma til landið tíðliga í vár, og prísirnir byrja við kr. 67.900.

## FAKTA

### Suzuki GSF 650 S AK7 (Bandit S)

| | |
|---|---|
| **Motorur** | 4 cyl. (4 takt), DOHC v. vatnkøling |
| **Motorstødd** | 656ccm |
| **HK v/snún.** | 85/10500 |
| **Moment v/snún** | 61,5/8900 |
| **Boring/slaglongd** | 65,5 x 48,7 mm |
| **Startarasystem** | Elektriskt |
| **Transmissión** | 6-trins |
| **Longd** | 2130 mm |
| **Fríhædd** | 150 mm |
| **Seturhædd** | 770-790 mm |
| **Vekt** | 222 kg |
| **Bremsur frammman** | Dupultar skivur |
| **Bremsur aftan** | Einkultar skivur |
| **Dekk framman** | 120/70ZR17 M/C 58W |
| **Dekk aftan** | 180/55ZR17 M/C 69W |
| **Bensintangi** | 19 litrar |
| **Prísur** | kr. 76.138,- v. ABS |
| **Søluumboð** | MC-Sølan<br>Skemmingsgøta 23<br>FO-100 Tórshavn<br>Tel. 315674 / 216300<br>www.mc-solan.fo |

* ”GSF 1250 S AK7” (1250 cc) við ABS-bremsum kostar kr. 95.600

Saturn Aura:

# Ársins bilur í Norðuramerika

**Á Detroit Motor Show, sum er í Detroit í USA í hesum døgum, er Saturn Aura, ið er so gott sum sami bilur sum Opel Vectra, kosin ”North American Car of The Year 2007”**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Hóast vit ikki kenna nógv til amerikanska bilmerki Saturn, er tað eitt kent bilmerki handan hav, har teir koyra sum persónbilar, MPV og sportbilar.

Saturn Aura, ið er so gott sum sami bilur sum Opel Vectra og bygdur yvir sama plattform, er kosin ”North American Car of The Year” á Detroit Motor Show, sum er í Detroit í USA í hesum døgum.

Í sambandi við stóru framsýningina verður hesin heiður árliga latin av umleið 50 kendum motorjournalistum úr USA og Kanada. Í ár var kappingin millum 31 ymiskar bilar.

Ein annar General Motors bilur, Chevrolet Silverado, varð kosin ”North American Truck of The Year”.

Heiðurin verður latin til bilar, som hava skarað framúr innan t.d. nýhugsan, trygd, koyrieginleikar, design, og virði fyri pengarnar.

Saturn Aura hevur verið á amerikanska marknaðinum síðan august 2006.

Saturn er eitt bilmerki hjá General Motors, sum varð sett á stovn í 1985, til at kappast við evropeisku og japansku bilmerkini á amerikanska marknaðinum.



*Saturn Aura er kosin ”North American Car of The Year” á Detroit Motor Show*






Framleiðslumet:

# 100.000 Vespur í 2006

Fyri jól koyrdi ein reyður Vespa GTS 250 skutari av samlibandinum á Piaggio verksmiðjuni í Pontedera í Italia. Hesin var skutari nummar 100.000 – hagsta tal í 16 ár. 2006 var eisini árið, tá Vespa-skutararnir fyltu 60 ár.

Upp á trý ár hava italienararnir tvífaldað framleiðsluna av tí kenda klassiska Vespa-skutaranum, sum hesi seinastu árini er vorðin sera væl umtóktur bæði í USA og í Evropa. Síðan framleiðslan byrjaði í1946, eru seldir umleið 17 milliónir Vespa-skutarar.

At Vespa eru so væl umtóktir skutarar er helst klassiska italska designinum fyri at takka, verður sagt.

